


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Arbeiðsumstøður og arbeiðsumhvørvi


Val ✗

EYÐUN ELTTØR
fyrrverandi landsstýrismaður
Sjálvstýri
www.sjalvstyri.fo

Seinastu tíðina hevur stór misnøgd valdað um okkara fremstu vælferðarstovnar, sjúkrahúsverkið og skúlaverkið.

Brúkarin er misnøgdur við viðgerð og úrslit, meðan strongd starvsfólk av røttum eru misnøgd við arbeiðsumstøðurnar.

Alt ov ofta verður leitað eftir quick fix loysnum, tá ið akuttir trupulleikar hava tikið seg upp. Um vit heldur høvdu ein áhaldandi dialog um arbeiðsumhvørvið, kundi nógv verið fyribyrgt.

Vanliga fatanin av hugtakinum arbeiðsumhvørvi er ov smøl og verður oftast bara hugsað um arbeiðstrygd, eitt nú vandamiklar maskinur, byggipláss og trygdarhjálm.

Arbeiðsumhvørvi fatar um nógv meira og í eini komandi samgongu fer Sjálvstýrið at raðfesta arbeiðsumhvørvið.

Fyrst fara vit at staðfesta forsvarligt arbeiðsumhvørvi sum ein rætt í føroysku grundlógini.

Síðani vilja vit gera hetta ítøkiligt við at tryggja, at arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar í felag brúka tíð til at umrøða arbeiðsumhvørvið á øllum arbeiðsplássum, ið hava starvsfólk í arbeiði. Øll arbeiðspláss skulu hava skyldu at gera eina árliga meting av arbeiðsumhvørvinum. Arbeiðseftirlitið skal tryggja, at metingin verður gjørd og áhaldandi dagførd.

Henda skyldan skal ikki bara fevna um privatar arbeiðsgevarar, men sanniliga eisini um almennar arbeiðsgevarar.

Í okkara grannalondum hava slíkar metingar, m.a. innan heilsurøkt, viðført ein støðugan dialog millum arbeiðsgevara og starvsfólk um arbeiðsumhvørvi í breiðari merking, m.a. arbeiðsstøður, sálarligt arbeiðsumhvørvi, arbeiðsuppgávur og arbeiðstrýst – og í framhaldi av hesum eisini starvsfólkanormeringar.

Soleiðis menna vit arbeiðsumhvørvið - stig fyri stig.

# Landið má lata uppgávur frá sær, sum tað ikki megnar


Val ✗

ANNFINN BREKKSTEIN
Sambandsflokkurin
www.brekkstein.com

Fyri at styrkja tey bleytu virðini og uppraðfesta tey, er neyðugt at fáa greiðan skilnað millum land og kommunur. Her hugsi eg um tann ovurhondstóra tørvin á ellisheimum og røktarheimsplássum. Bert í miðstaðarøkinum eru í løtuni umleið 120 fólk á bíðilista til ellisheims- og røktarheimspláss.

Av teimum 120 hava umleið 60 akuttan (bráðfeingis) tørv. Landið hevur misrøkt sínar skyldur á hesum øki, og tí er einasti útvegur at leggja eldraøkið út til stórar kommunalar eindir at umsita.

Fyri at hetta kann lata seg gera, er neyðugt at kommunurnar leggja saman, so vit fáa sjey stórar kommunur í Føroyum.

Kommunurnar hava víst, at tær megna uppgávur, sum verða lagdar út til tær at umsita, og her hugsi eg um barnaansingina, sum bleiv løgd út til kommunurnar at umsita. Eitt nú í Tórshavnar kommunu eru nærum eingin bíðilisti til barnaansing longur.

Tað, sum gongur fyri seg á eldraøkinum í løtuni, er alt annað enn nøktandi. Eldri fólk liggja óhjálpin heima og avvarðandi eru í dýrastu neyð fyri at fáa dagin at hanga saman.

Trivnaður, livikor og vælferð skulu raðfestast hægri enn asfalt og betong. Sambandsflokkurin hevur dirvi at ganga undan, og tað hava vit víst í verki. Skilagóð búskaparstýring tryggjar vælferðina.

# Reint umhvørvi ein fortreyt


Val ✗

FRANK JACOBSEN
Miðflokkurin

Føroyar eiga at vera við í arbeiðinum at gera nýggja altjóða veðurlagsavtalu, sum lond eru farin undir at gera. Henda avtalan kemur í staðin fyri Kyoto.

$CO_2$ útlátið veksur, og hetta førir við sær, at hitin á jørðini og í høvunum gerst hægri. Hetta skapar ójavnvág, og tí mugu tiltøk, sum minka um $CO_2$ útlátið, setast í verk.

Miðflokkurin vil virka fyri, at Føroyar vera við í tilgongdini tá nýggja avtalan, sum skal avloysa Kyoto, skal gerast.

Miðflokkurin vil seta krøv, sum virka tálmandi á $CO_2$ útlátið. Skip skulu nýta orkusparandi tól, og hús skulu bjálvast so, at tey nýta sum minst av orku.

Áðrenn projekt verða sett í gongd, eigur at verða kannað, hvussu hetta ávirkar náttúruna og umhvørvið. Stig skulu síðan takast, sum rætta uppá eitt negativt árin.

Tú finnir meg á lista H

# Ferðslupolitikkur


Val ✗

MARJUS DAM
Sambandsflokkurin

**Hálkubreyt skal gerast beinanvegin**

Hendan kann vera við til at minka um skaðar á okkara landsvegum.

Álit er gjørt um Nullhugsjón í ferðsluni. Álitið gongur út uppá at minka deyða og skaða í ferðsluni við átøkum og broytingum á okkara vegum. Hesi átøk skulu setast íverk. Tað vil minka um sorgarleikir á okkara vegum

Tað er neyðugt, at ferðslulæra og frálæra verður fingin í rættlag.

Vit mugu tryggja, at okkara koyrilærarar altíð hava eina dagførda útbúgving og eftirútbúgving.

Vit mugu tryggja, at bíðitíðin at taka koyrikort ikki verður órímiliga long. Frálærutilfar á føroyskum máli, skal sjálvandi skrivast á ein hátt, ið fólk fata.

# Kom í gongd


Val ✗

JØRGEN NICLASEN
formaður Fólkaflokksins

Vit eiga at seta størri prís uppá fólk, ið vilja royna nakað nýtt. Vit eiga at fáa eina hugburðsbroyting í Føroyum. Fólkaflokkurin hevur ein greiðan íverksetarapoltikk, har íverksetarar eiga at verða stimbraðir og stuðlaðir.

Íverksetarar skulu føla seg heima. Bæði í fólkaog miðnámsskúlum skal íverksetan verða ein lærugrein.

Íverksetarahús kring landið skulu stuðlast, men virka í tøttum samstarvi við vinnulívið fyri at fáa góða ráðgeving. Hesi hús skulu hjálpa íverksetarum at koma skjótt í gongd og virka sum snarskiva mótvegis almennum myndugleikum.

Atgongd til váðafúsan kapital skal betrast. T.d. gjøgnum grunnar hjá landinum.

# Førleikagevandi útbúgvingar kring landið


Val ✗

JOHN JOHANNESSEN
Javnaðarflokkurin
www.john.fo

**Verulig økismenning liggur í at skipa førleikagevandi vaksnamannaútbúgvingar á miðnámsdeplunum kring landið. Við John Johannessen á tingi fer Javnaðarflokkurin í næsta valskeiði at taka ítøkilig stig fyri hesum**

Væl útbygdu og nýggju miðnámsskúlarnir kring landið eiga eisini at verða brúktir sum deplar fyri førleikagevandi vaksnamannaútbúgvingum.

Við nýggju tøknini ber til at skipa stóran part av frálæruni sum sjónvarpsfundir, har lærarin er staddur aðrastaðni í landinum ella enntá uttanlands.

Slíkur útbúgvingarmøguleiki hevði gjørt, at fleiri ungar familjur høvdu haft møguleikan at verið búgvandi í økinum og nomið sær útbúgving samstundis. Harumframt gevur hetta ófaklærdum tilkomnum ein frálíkan møguleika at ganga útbúgvingarleiðina og harvið betra síni starvsviðurskifti.

Eingin sigur, at ein Miðnámsskúli skal steingja seinnapart klokkan 16. Tað ber væl til at skipa veruligar førleikagevandi vaksnamannaútbúgvingar um kvøldið. Hetta er ein frálíkur háttur at betra um útbúgvingarmøguleikarnar bæði hjá ungum og eldri, samstundis sum vit á hendan hátt gagnnýta stóru íløgurnar í nýbygging av miðnámsskúlum kring landið til fulnar.

Soleiðis økismenna vit Føroyar og skapa Føroyar fyri øll!